## Vínsmakking

Í Føroyingafelagnum í Århus hava tey nú sett sær fyri at kanna, um tað ber til at drekka reyðvín aftur við fiski ella høsnarunga, samstundis sum tey ætla sær at fáa at vita, hvørjum ein skal hyggja eftir, tá ein ætlar sær at keypa gott vín. Tí verður eitt tiltak í Áarstovu tann 28. oktober, har ein vínkønur dani fer at greiða frá. Hann fer eisini at siga frá víni úr teimum ymsu heimspørtunum, og fólk fáa høvi at royna tey ymsu sløgini.



## Stillar uppaftur

Í síðstu viki frættist, at norðoyatingmaðurin Vilhelm Joahnnesen stillar ikki upp á næsta løgtingsvali, og samstundis ljóðaði, at Annfinn Kallsberg umhugsar sína støðu. Hinvegin er greitt, at veljararnir í Norðoyggjum fáa í hvussu er høvi til at seta kross fyri Jógvani við Keldu, tá val verður aftur. Hann sigur við Norðlýsið, at hann gjørdi av at stilla uppaftur, tá hann fór úr landsstýrinum. Á seinasta vali fekk Jógvan við Keldu 200 atkvøður.

# Javnaðarflokkurin: Vit tryggja vælferðarbatar

LANDSFUNDUR

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Javnaðarflokkurin hevur havt landsfund í vikuskiftið í Miðvági. Í landsfundarsamtykt sigur landsfundurin, at hann fegnast um, at tað hevur eydnast Javnaðarflokkinum at tryggja vælferðarbatar í hesi samgonguni, og at arbeiði er til flestar hendur, og framgongd er í búskapinum.

**Landsfundarsamtyktin er soljóðandi:**

- at útgjaldið úr samhaldsfasta á nýggjárinum verður umleið 2 túsund krónur, so at tryggjað verður einum støkum fólkapensjónisti góðar 9 túsund krónur um mánaðin og pensjónistahjúnum 15 túsund um mánaðin.
- at stig verða tikin til, at tímalønt fáa rætt til at vera heima hjá sjúkum barni eins og tey alment løntu.
- at heimleys fáa betri sømdir.
- at stig eru tikin at styrkja javnstøðuna, við tað at øll foreldur hava møguleikan at velja felags foreldramyndugleika.
- at forsyrgjarar í trongum korum kunna fáa hækkaðan barnastuðul.
- at bústaðarpolitiska ætlanin hjá samgonguni verður sett í verk.
- at ítøkilig stig eru tikin til at nøkta tørvin á eldrabústøðum kring landið.
- at farið verður undir fasta sambandið til Sandoynna
- at samgongan framhaldandi ger munandi íløgur í útjaðaranum
- at Javnaðarflokkurin fekk loyst flogvallarmálið.
- at løgmaður hevur tikið ítøkilig stig til at brynja Føroyar til altjóðaagerðina við visjónsarbeiðinum, uttanríkispolitisku heimildarlógini og slóðanini fyri øktum samstarvi við útheimin á vinnu-, útbúgvingar-, og menningarpolitiska økinum.
- at løgmaður gongur fremst í stríðnum fyri tolsemi og virðing millum menniskju.

**Samstundis ásannar landsfundurin, at framhaldandi er neyðugt við Javnaðarflokkinum í landsins leiðslu fyri at kunna loysa átroðkandi avbjóðingar so sum:**

- at styrkja fólkaskúlan við at styrkja felagsskapin og fakligheitina. Landsfundurin tekur úrslitið av PISA kanningini í størsta álvara og ásannar, at neyðug stig mugu takast.
- at steðga spekulatióníni í fiskivinnuni. Landsfundurin heldur fast um, at fiskiríkidømið er ogn Føroya fólks.
- at fáa politisku skipanina at ásanna týdningin av einum virknum orku- og umhvørvispolitikki og at taka ítøkilig stig á hesum øki.
- at fáa styrkt javnstøðuarbeiðið, soleiðis at tað gevur úrslit í politisku skipanini og samfelagnum annars.
- at fremja rúmligan arbeiðsmarknað fyri fólk við skerdum førleika , og at lægsta fyritíðarpensjón verður tikin av.
- at hægri útbúgvingarstuðul verður veittur forsyrgjarum undir útbúgving, og at barsilsskipanin eisini fer at umfata lesandi. At Javnaðarflokkurin fekk loyst flogvallarmálið.
- at Javnaðarflokkurin tryggjar, at eldrarøkt, skúli og aðrar umsorganartænastur ikki verða einskildar.

Vit hava meira frá landsfundinum í blaðnum í morgin.



*Eyðun Johannesen av Oyrarbakka & Palle Dalsgaard úr Skálavík á landsfundi hjá Javanaðarflokkinum í Miðvági um vikuskiftið.*

# Løgreglan var nógv úti

**Á løgreglustøðini hava tey ikki sitið hendur í favn. Bæði fríggjakvøld og leygarkvøld vóru tey ofta boðsend, men trupulleikarnir loystu seg sjálvar sum oftast**

LØGREGLUTÍÐINDI

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Fríggjakvøldið var eitt av teimum strævnu hjá løgregluni. Trupulleikarnir vóru ikki teir størstu, men teir vóru nógvir í tali. Serliga varð løgreglan boðsend at skilja ófriðarkroppar sundur, og sum oftast er tað nóg mikið hjá teimum at koma á staðið, men í einstøkum førum var neyðugt at blanda seg.

Í einum føri noyddist løgreglan at taka tveir mans við sær á støðina. Tað var á einum dansistað, har tveir mans ikki tímdu út, tá tíð var at gevast. Í staðin bjóðaðu teir av at berjast, og so varð løgreglan boðsend. Teir komu á staðið og tóku ólátaðu menninar við á støðina, har teir gistu.

**Nógv úti men lítið kom inn**

Leygarkvøldið var heldur friðarligari. Fótbóltsárið endaði og nógv fólk var í býnum, men sum heild var lagið gott á fólki, og tá eru sjáldan trupulleikar.

– Løgreglan var tó nógv úti, men tíbetur kom lítið inn, sigur vakthavandi á løgreglustøðini í morgun.

Onkur brot vóru á politiviðtøkurnar. Ein kúllur helt tað var eitt gott hugskot at bróta eina fløsku uttan fyri løgreglustøðina, men má nú sanna, at tað var betur ógjørt.

**Rýmdu frá ferðsluóhappi**

Sunnumorgunin var eitt ferðsluóhapp í Leynum, har ein bilur rendi á ein garð. Tríggir mans vóru í bilinum, og tveir teirra rýmdu av staðnum, men vórðu tiknir aftur beinanvegin.

Ongin skaði stóðst av hesum, men løgreglan veit enn ikki, hvør teirra koyrdi bilin. Blóðroynd er so tikin av øllum trimum, tí okkurt er sum bendir á, at menninir vóru ávirkaðir, og so mugu víðari kanningar vísa, hvør tað var, sum koyrdi bilin.

Eisini í Kollafirði var eitt minni ferðsluóhapp um vikuskiftið. Fríggjakvøldið fór ein lastbilur útav vegnum á Signabø. Vegurin har er so smalur og bilurin so stórur, og tí var øll ferðsla til og frá Signabø tarnað í hálvanannan tíma, tá ein brandbilur fekk bilin uppaftur.



*Á Signabø fór ein lastbilur út av vegnum, og av tí at vegurin er so mikið smalur har, so var øll ferðsla tarnað í hálvanannan tíma, áðrenn lastbilurin var fingin upp og av vegnum*

– Sum heild kann sigast, at døgnrapportin fyllir nógv, men tíbetur er talan um smáting, sum ikki hava givið stórvegis trupulleikar, sigur vakthavandi á løgreglustøðini.